# Vágafólk

**Dýrabiðidagsstevna**

vælkomin til dýrabiðidagsstevnu,
í døgunum 22.-24. apríl 2005.
Stevnan verður hildin í bygdarhúsinum í Miðvági
og í Missiónshúsinum Libanon Sørvágur.

Vit savnast á stevnuni um Harrans orð og lyfti, tað
verða ymisk sum koma at luttaka við sangi,
talu og vitnisburði.

***Skrá:***

**Dýrabiðidag**
kl. 20 - Møti í bygdahúsinum í Miðvági

**Leygardag**
kl. 20 - Møti í bygdahúsinum í Miðvági

**Sunnukvøld**
kl. 18 - Møti í Missiónshúsinum í Sørvági

*Hesi luttaka við talu, sangi og vitnisburði:*
Jógvan Lamhauge, Hedvig og Hallmar Winther,
Hjalgrím Davidsen, Thomas J. Askham,
Trioin á Soli Dio Gloria, Magda og Meibritt,
streingjakóri í Vágunum og fl.

Dýrabiðidag verður høvi at ogna sær fløgur, bøkur
og videofilmar. Á møtinum verður innsavnan til
arbeiði.

Hebr. 13.8 Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og
um allar ævir.

Øll eru hjartaliga vælkomin til stevnuna hesar dagar

**Leiðslan fyri Fundarrøðina**





-so eru tit við!

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3934**
**Navn:** Sp/f Plátuverkstaðið
**Adressa:** Millum Gilja 41 188 Hoyvík
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 14-04-2005
**Viðtøkudato:** 14-04-2005
**Stovnarar:**
Glenn Robert Perdomo, Millum Gilja 41, 188 Hoyvík
**Stjórn:**
Glenn Robert Perdomo, Millum Gilja 41, 188 Hoyvík, (stjóri)
**Grannskoðari:**
Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen,skrás.grannsk, J. Broncksgøta 16, Box 16, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka plátu- og lakkverkstað, bilsmíð og annað starv í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 14.04.2005 - 31.12.2005

Skráseting Føroya
tann 18. apríl 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3531,** Sp/f K. A., 700 Klaksvík.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Karstin Drenkstein Johannesen, Víkavegur, 700 Klaksvík (nevndarformaður)
**Innkomin í nevndina:**
Nikolas Solmunde Olsen, Skáltavegur 29, 700 Klaksvík (nevndarformaður)

Skráseting Føroya
tann 18. apríl 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 44**, P/F Hvannasund, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 15.01.2005
**Partapeningur:** Lækking við kr. 420.000,00 til kr. 80.000,00 til úgjalding til partaeigarar, viðtikið 27.09.2004, er nú gjøgnumførd

Skráseting Føroya
tann 18. apríl 2005

Kristin Balle

---


# Skeið í matvørureinføri

***Skeiðið er ætlað øllum ið arbeiða við mati á stovnum, fyritøkum, kantinum o.ø***



*Tíð og stað:* Skeiðið verður mánadagin 9 mai 2005 frá 9-16 á Húsarhaldsskúla Føroya

*Prísur:* 1000 kr, íroknað mat og tilfar

*Undirvísari:* Elisabeth Akursmørk

***Undirvísingin umfatar:***

***Bakteriur:***
- Tær ið gera gagn
- Tær ið oyðileggja matin
- Tær ið er sjúkuframkallandi
- Hvørjar tær eru og hvar tær finnast
- Hvussu tær liva i mun til viðurskiftir, sum hita/kulda, vætu, ph-virði, ilt og annað
- Kritisk punktir sum heild

***Reinføri í samband við matvørur:***
- Innkeyp av rávørum, móttøka og goymsla.
- Matvøruframleiðsla, (fyrireiking, hitaviðgerðing, niðurkøling)
- Tíð og hiti

***Reinføri í samband við amboð:***
- Dálkan við amboðum
- Korssdálkan v.m.

***Persónligt reinføri:***
- Hendur, kroppur og hár
- prýðislutir og ur
- Arbeiðsbúnin
- Sjúka

***Reingerðing og sóttreinsan***

***Bakteriudyrkan:*** Vit hyggja at royndum ið eru tiknar av ymiskum amboðum o.l.

Húsarhaldsskúli Føroya - Stoksoyrarvegur 29 - 700 Klaksvík
Tlf. 456974 - T-postur: hsf@post.olivant.fo

HSF

Sosialurin 341800



## SØKT VERÐUR EFTIR FÓLKI
### til goymsluna í Idé Møblum



SANSIR 355 355

Vit sóknast eftir einum dugnaligum og ágrýtnum fólki til alt fyrifallandi arbeiði í goymsluni.

Arbeiðið fevnir um útkoyring, at seta upp á pláss, lossa, seta møblar saman og alt annað fyrifallandi arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert handverkari ella fittur í hondunum.

Tú byrjar at arbeiða sum skjótast. Lønin verður eftir avtalu. Vilt tú annars vita meira um starvið, ert tú vælkomin at spyrja teg fyri hjá Birgiri Andreasen á telefon 214680.

Skrivlig umsóknir verður at senda til:

IDEmøblar
Postsmoga 3220
110 Tórshavn


Sosialurin
Sosialurin
i